# Stong Hotel Tórshavn

**Hotel Tórshavn er vorðin ein forðing fyri menning av viðgerð uttanlands, ein køstur fyri Ríkissjúkrahúsið og ein vandi fyri sjúklingarnar, heldur Jákup Petersen, yvirlækni**

**JÁKUP PETERSEN**
yvirlækni



Hotel Tórshavn er eitt skip uttan skipara sum siglir sín egna sjógv við sínum vandamikla farmi.

Grundreglan fyri viðgerð uttanlands er, at yvirlæknar í føroyska sjúkrahúsverkinum kunnu senda sjúklingar til útlendsk sjúkrahús til víðari viðgerð og kanning. Hetta hevur bara eydnast væl á ymiskum sjúkrahúsum í Danmark og øðrum norðanlondum.

Men í Keypmannahavn vaksa trupulleikarnir støðugt orsaka av, at vit hava eitt hotell har sum er ein blandingur av hotell, røkt, viðgerð, rehabilitering, seingjardeild og tilhald. Uttan neyðuga ábyrgd, karmar og førleika siglir hetta skip sín egna sjógv við sínum vandamikla farmi.

Onnur sjúkrahús í Danmark og øðrum norðanlondum hava fyri langari tíð síðan loyst viðurskiftini viðvíkjandi kanning og viðgerð av føroyskum sjúklingum.

Helst er tað so, at Ríkissjúkrahúsið er eitt tað vánaligasta til at leggja til rættis kanning og viðgerð fyri føroyingar. Onnur sjúkrahús uttanlands eru væl betri fyri. Har eru sjúklingar og avvarðandi innan fyri sjúkrahúsins karmar og læknaábyrgd alla tíðina meðan kanning og viðgerð fer fram.

Har tað er møguligt verða sjúklingar útskrivaðir til ambulanta kanning og viðgerð og búgva saman við avvarðandi á vanligum hotellum ella á sjúkrahússins sjúklingahotelli undir ábyrgd sjúkrahúsins.

Hendir nakað, so hevur sjúkrahúsið og viðgerðandi lækni beinleiðis ábyrgd av teimum. Henda skipan fær sjúkrahúsið at leggja doyin á. at kanning og viðgerð er vælskipað, dygg og trygg.

Ríkissjúkrahúsið brúkar Hotel Tórshavn sum køst fyri sína vánaligu planlegging, til vanda fyri sjúklingar og ótta hjá avvarðandi.

Í Keypmannahavn eru viðurskiftini annarleiðis. Læknarnir á Ríkissjúkrahúsinum kenna ikki stovnin Hotel Tórshavn, men brúka hann sum køst fyri teirra vánaligu skipan av kanning og viðgerð.

Sjúklingar koma á Ríkissjúkrahúsið til viðgerðar, men tá teir eru komnir á deildina verða forkanningarnar, sum gjørdar eru í Føroyum ikki góðkendar. Hetta sjálvt um tær hava ligið á deildini í mánaðir. Sjúklingurin verður so sendur til Hotel Tórshavn har hann kann bíða í fleiri vikur og mánaðir.

Til tíðir verða sjúklingar útskrivaðir til Hotel Tórshavn frá Ríkissjúkrahúsinum sum als ikki eiga at verða har. Oftast sjúklingar sum áttu at verið sendir heim til sjúkrahús í Føroyum sum liður í víðari viðgerð og røkt á sjúkrahúsi ella ambulant og beinleiðis undir lækna ábyrgd.

Summir sjúklingar sum bíða eftir víðari kanning og viðgerð eftir skurðviðgerð á Ríkissjúkrahúsinum eiga als ikki at liggja á Hotel Tórshavn, men at koma heim til føroysk sjúkrahús at liggja ella ganga ambulant her heima til tað aftur er tíð til at kannast og viðgerast á Ríkissjúkrahúsinum.

Hotel Tórshavn hevur gjørt viðurskiftini so ótrygg, at eg helst vil sleppa frá at senda sjúklingar til Keypmannahavn og havi í stóran mun sent sjúklingar til onnur sjúkrahús har kanning, viðgerð, sjúklingagongd og ábyrgd eru á høgum støði.

**Ábyrgdarloysi í kanning og viðgerð**

Vit yvirlæknar verða regluliga ringdir upp av avvarðandi við hópin av spurningum um Hotel Tórshavn. Tað sum gongur aftur er, at avvarðandi hava ótta fyri røkt av sjúklingi sum liggur á Hotel Tórshavn og vilja sleppa niður at røkta sjúklingin.

Ríkissjúkrahúsið hevur ikki ábyrgd av hesum stovni, vit yvirlæknar hava ikki ábyrgd av hesum stovni. Hinvegin eru hetta sjúklingar, sum yvirlæknar í Føroyum hava kannað og viðgjørt og síðani sent til yvirlæknar á Ríkissjúkrahúsinum til víðari kanning og viðgerð.

Her hongur onki saman. Vit yvirlæknarnir í Føroyum kenna ikki tað seinasta um sjúklingin, men skulu taka ábyrgd fyri at senda avvarðandi av landinum fyri at røkta sjúklingin, ella frá Føroyum taka støðu um sjúklingurin skal takast heim. Hetta uttan at hava sæð sjúklingin.

Ríkissjúkrahúsið hevur útskrivað sjúklingin og hevur sostatt heldur ikki ábyrgd av sjúklinginum. Hotel Tórshavn fær so til ein triða part, sum als onki kennir til sjúklingin fyri, at geva ráð viðvíkjandi viðgerð. Tað eru fleiri við mær sum meta hesi viðurskifti sera ótrygg.

**Nýtt Hotell Tórshavn fer bert at økja um verunligu trupulleikarnar**

At fáa eitt nýtt og størri Hotell Tórshavn økir bert um trupulleikan. So verður tað enn lættari at senda sjúklingar við vánaligari planlegging til hotellið, tað verður enn lættari at senda hálvvánaligar sjúklingar út á hotellið meðan bíðað verður eftir næsta stigi í kanning og viðgerð, og sjúklingar koma framhaldandi at liggja í ábyrgdar tómrúmi.

**Stong Hotel Tórshavn**

Einast rætta er at steingja Hotel Tórshavn. Sjúklingar sum hava tørv á sjúklingahotelli verða at brúka Ríkissjúkrahúsins sjúklingahotell har sjúkrahúsið hevur ábyrgd fyri sjúklinginum.

Teir sjúklingar sum annars ikki kunnu verða á hesum sjúklingahotelli verða sendir aftur til føroysk sjúkrahús har teir verða innlagdir og fáa skipaða útskriving til heimið undir yvirlækna ábyrgd. Partvís sum endalig viðgerð og partvís í bíðan eftir framhaldandi kanning og viðgerð á Ríkissjúkrahúsinum.

Avvarðandi til sjúklingar á Ríkissjúkrahúsinum fáa pláss á vanligum hotellum ella ríkissjúkrahúsins sjúklingahotelli. Hetta fær ábyrgd fyri kanning og viðgerð upp á pláss aftur. Tað fer at fáa Ríkissjúkrahúsið at leggja doyin á, at skipa kanning og viðgerð fyri føroyskar sjúklingar og tað loysir trupulleikan við hóskandi bústaði fyri avvarðandi.

Samstundis kemur kanning, viðgerð og planlegging av føroyskum sjúklingum í Keypmannahavn upp á sama støðið sum á øðrum sjúkrahúsum í Danmark og norðanlondum. Vit fáa eins og skipaði viðurskifti við okkara viðgerðarstovnar uttanlands.

Sjúklingaábyrgd verður kontinuerlig og fylgir viðurkendum læknaligum grundreglum fyri kanning og viðgerð á sjúkrahúsum og sjúklingar og avvarðandi fáa sømilig kor aftur.

# Greiður meiriluti fyri barnakekkinum

**JOHN**
Løgtingsmaður
www.john.fo



**Forsyrgjarar undir útbúgving kunnu gleða seg. Tí eftir summarfrítíðina kemur nýggj skipan í gildi, sum leggur eitt barnaútgjald oman á útbúgvingarstuðulin. Talan er í fyrstu atløgu um 500 krónur um mánaðin fyri hvørt barnið, men framsøgufólk úr øllum flokkum siga seg sinnað at hækka útgjaldið.**

Javnaðarflokkurin hevur síðani valið strongt á, fyri at skapa betri fíggjarligar møguleikar hjá forsyrgjarum at nema sær útbúgving. Í vetur samtyktu vit lóg um barsilsskipan fyri lesandi, sum gevur møguleika fyri at barnsburðarfarloyvi í eitt heilt ár við fullum útbúgvingarstuðuli. Skipanin er bæði galdandi fyri mammur og pápar á jøvnum føti. Hendan skipanin kom í gildi á nýggjárinum.

Næsta og mest týdningarmikla stigið verður tikið við lógaruppskotinum, sum í hesum døgum er til viðgerðar í løgtinginum. Nú snýr tað seg nevniliga um at betra um møguleikarnar at vera lestrarvirkin og forsyrgjari samstundis. Hetta gera vit við at leggja ein forsyrgjarastuðul oman á útbúgvingarstuðulin. Í lógaruppskotinum frá landsstýrismanninum í mentamálum er upphæddin sett til 500 krónur fyri hvørt barnið um mánaðin. Tað vil siga 1.000 krónur, um tú t.d. eigur tvey børn og er í gongd við útbúgving.

Møguleiki er fyri, at upphæddin verður hækkað, áðrenn lógaruppskotið verður samtykt. Í øllum førum hava bæði eg sjálvur og framsøgufólk úr øðrum flokkum mælt til, at mentanarnevndin viðger møguleikan at hækka upphæddina. Mentanarnevndin heldur sín fyrsta fund um málið týsdagin 27. mars.

Tað var eftir kravi frá Javnaðarflokkinum, at tað eydnaðist at fáa niðurfelt í samgonguskjalið, at skipanin við lestrarstuðuli skuldi endurskoðast. Endamálið skuldi vera, at fáa hækkað stuðulin til forsyrgjarar umframt at geva lesandi møguleika at fara í barnsburðarfarloyvi við fullum lestrarstuðuli. Hesi lyfti eru nú hildin við góðum stuðuli frá landsstýrismanninum í mentamálum og samgonguni annars.

Javnaðarflokkurin er av teirri sannføring, at so góðir útbúgvingarmøguleikar til so stóran part av fólkinum sum gjørligt, er sjálv høvuðs fortreytin fyri samfelagsligari menning. Allir føroyingar skulu hava javnbjóðis fíggjarligar møguleikar at velja útbúgvingarleiðina og harvið tryggari starvs- og fíggjarviðurskifti.

# Kemur tú Tjaldur ár eftir ár

**MALMBERG D. OLSEN**



Dagarnir leingjast, og várið sambart álmanakkunum brýtur sær veg fram úr vetrarmyrkrinum, fyrsti várdagur var 22. febr. Dagarnir gerast longri, og sólin otar seg longri upp á himmalhválvið, kallar vøkstur fram, sum hevur ligið í dvala vetrarhálvárið. Tað er so forundarligt frá skaparins hond, at tað er altíð eitt nýtt vár sum brýtur sær sló fram úr vetrarmyrkrinum, várið síðsta ár kemur ongantíð aftur.

Várið ber boð um vøkstur og lív í natúruni, eitt ungdómslív kann líknast við várið har spírirnar til manndómsárini verða lagdar, lunnar vera lagdir fyri framtíðina, hvat skal eg blíva til? Hvat havi eg hug til? Og hvørjir eru framtíðarmøguleikarnir.

Í einum av bløðinum herfyri vóru daprir spádómar um framtíðina prentaðir á eina svarta síðu í sosialinum um veðurlagsbroytingar, sum liggja fyri framman hesar broytingar sigast verða skaptar av okkum menniskjum?

Spádómarnir eru ikki serliga stimbrandi lesnaður, men skal nok takast í størsta álvara. Spádómar um toskin, sum doyr og ísin, sum bráðnar og ísbjarnir, sum verða heimleysar. Ein fjøld av føroyingum kennir til ísin frá Grønlandstíðini, tá tað knilti í bæði borð tá roynt var at skorða seg ígjøgnum ísbrúnna, at finna ein hyl at seta nakrar stubbar av línu í, hettar tykist at fara í søgubøkurnar, sum mangt annað frá Grønlandstíðini.

Ein ráðstevna fyri og onnur eftir verða hilnar um, hvat skal gerast fyri at bjarga náttúruni frá undirgangi.

Her á klettinum kunna vit eisini staðfesta, at stórar veðurlagsbroytingar eru farnar fram seinastu árini. Tað at turka eina last av klippfiski undir opnum himli sum bleiv gjørt í mínum uppvøkstri, hevði neyvan latið seg gjørt í dag, og tað at fáa turt hoyggj av bønum er sera trupult eisini, tað prógva tær mongu súrhoyggjaballurnar, sum vit síggja meir og meir av í náttúruni.

Broytingar ella ikki, men ein sannroynd er, at higartil er tjaldrið okkara ímynd av várinum, kann tykjast sum tað kemu í so tíðliga nú fjallatopparnir eru kavaklæddir, men tað skert ikki burtur, at tað ber okkum boð um ljósari tíðir, at umsíður fer ljósið at vinna á myrkrinum og við várinum fara nógvir aktivitetir í gongd her á landi. Ítrótturin sum ikki hevur verið so sjónligur uttandura vetrarhálvuna vaknar til nýggjan leik á vølli, har nýggir spírar koma til sjóndar, sum rokna við eini framtíð á vøllinum, meðan aðrir takka fyri seg og gevast, vit liva í tíð komandi og farandi.

Kappróðrabátar verða flotaðir har unglingar gentur og dreingir skula kappast um at liggja stavnin frammanfyri, um steypið skal vinnast og allar kreftir verða brúktar til at náa málinum.

Nú eitt ár er eftir av hesum valskeinum, eru sterkar klimabroytingar komnar til sjóndar innan tinggátt, gassútlátið av 266b, sum bleiv íbirt á eini cafe í høvistaðnum kláraði at syndra ta føroysku tjóðina, uppskot sum kom frá andstøðuni bleiv samtykt av samgonguni, so her stendur 1-0 til andstøðuna, vanligt er at gera eftirmetingar av hvørjum dysti, serliga av tapandi liðnum? Bólturin í hesin leiki er farin á rull, nær næsti dystur í hesum leiki verður er ikki avgjørt í skrivandi løtu, og hvørjir spælarnir verða til næsta dyst, verður avgjørt við næsta løgtingsval.

Vit eru í bestu norðhavstíð, tá várðfiskurin kemur inn á grunnarnar at gýta, ikki minst her eru tað veðurlíkindini, hegni og áræði, sum avgera, hvat kemur burtur úr várðróðrinum. Jú veðurlagið er rættuliga viðkomandi fyri teir, sum søkja sjógvin og hava sína úrtøku av tí, sum dragast kann av grunni.

Veðurlagsbroytingar ella ikki, men ein sannroynd er, at tjaldrið einaferð enn er komið við sínum várliga klippi inn ivir oyggjar okkara tross heglingsæl so hvøss við fráboðan av stormi av vestri í skrivandi løtu so fer tað umsíður at grønkast um gangandi føt.

Guð signi mítt føðiland Føroyar.